Tórshavn 25. januar 2025

# Virksemisætlan SSF 2024-2028

Svimjisambandið ætlar at skipa fyri ella taka lut í fylgjandi tiltøkum í 2024, 2025,, 2026, 2027 og 2028, umframt møguliga fleiri, um hildið neyðugt og um fíggjar- og arbeiðsorka verður til tess.

## Árshjól SSF

SSF fylgir einum rættiliga føstum árshjóli, við undantøkum tá ið eitt kemur í vegin fyri annað. Nógv er beinleiðis ásett í reglugerð hjá okkum og øðrum, meðan annað er vegna langtíðar royndir.

Vanliga raðfylgjan er yvir árið:

- NSF aðalskrivarafundur, á skift í norðurlondum — januar
- SSF ársuppgerð til aðalfund SSF og ÍSF — januar/februar
- SSF kalendarafundur/svimjiráðstevna — februar
- SSF landsliðslegur til bruttohópar — februar
- SSF aðalfundur, vanliga í Havn — mars/apríl
- SSF landslið til Danish Open ella líknandi — apríl
- NSF ítróttastjórafundur, á skift í norðurlondum — apríl
- ÍSF várumboðsting, vanliga í Havn — apríl
- ÍSF aðalfundur, vanliga í Havn — apríl/mai
- SSF aldursbólkameistarastevna á stuttgeil (ABMS) — mai
- SSF føroyameistarastevna á langgeil (FML) — mai/juni
- SSF landsliðslega sum fyrireiking til altjóða stevnur — juni
- SSF landslið til NMU/EJM/EMU23/Oyggjaleikir/EM/HM — juni/juli
- AQUA aðalfundur tá ið HM er (t.e. annaðhvørt ár) — juli
- SSF & SSÍ felags ungdómslandsliðslega — september
- NLSG ársfundur, á skift í norðurlondum — september
- EA aðalfundur og NSF ársfundur, á skift í evropeiskum londum — september
- SSF umsóknir til Úrval, ÍSF-puljur, AQUA — september/oktober
- SSF landslið til World Cup, tey ár tá ið eitt er í Evropa — oktober
- SSF føroyameistarastevna á stuttgeil (FMS) — oktober/november
- SSF fráboðan um stevnur til kalendarar EA & AQUA — november
- SSF landsliðslega sum fyrireiking til altjóða stevnur — november
- SSF gallaveitsla, fyriskipað av serliga íðkaranevndini — november
- SSF landslið til NM/NJM/EMS/HMS (EM/HM á stuttgeil) — desember
- SSF uppgerðir til Úrval, AQUA og tryggingina — desember/januar

**Viðmerkingar**

- EM/HM og EMS/HMS eru uppá skift, annaðhvørt ár
- EM verður hartil vanliga flutt til mai/juni, tað árið tá ið OL er
- Annars verður eftir tørvi lagt afturat ella flutt og strikað, sum tað nú fellur

## Altjóða tiltøk í Føroyum

SSF er regluliga vertur fyri altjóða stevnum og tiltøkum, serliga í norðurlendskum høpi.

Fyri framman hesi næstu árini, eru:

- Norðurlendsk svimjifrálæruráðstevna í Tórshavn hin 18. til 20. oktober 2024
- Norðurlendskur ítróttastjórafundur í 7. og 8. mai 2025
- Norðurlendska Meistarastevnan fyri Ung í Tórshavn hin 5. og 6. juli 2025
- Felags SSF/SSÍ ungdómslandsliðslega í Tórshavn 13. - 14. september 2025
- Oyggjaleikir í Føroyum í juli 2027

Hartil royna vit at menna eina árliga altjóða stevnu í Føroyum, sum í grannalondum okkara.

## Aðrar stevnur í Føroyum

Føroysk svimjing hevur í mannaminni avtalað á árligum kalendarafundi, nær og hvar hesar ymisku svimjistevnurnar skulu vera í Føroyum, sum SSF og tilhoyrandi limafeløg skipa fyri. Hetta kanska serliga vegna frástøðuna til onnur lond, og vegna avmarkaðu nøgdina av fyriskiparum, sum ger at tað gevur meining at samskipa nær og hvar tilboðini eru, sum vit nú einaferð klára at skipa fyri.

Á hesum fundum royna vit eisini at avtala onnur møgulig tiltøk skulu verða, umframt yvirhøvur at viðgera felags mál so sum hvussu nógvir dómarar hvørt felag skal møta við.

Høvuðsskjalið frá hesum fundi, er kalendarin á https://ssf.fo/kalendari/, umframt fundarfrágreiðing. Vit plagdu at avtala næsta svimjiár, tvs. til 31. august, men royna nú at avtala alt næsta kalendaraár.

## Landsliðsvirksemi

Ætlaða landsliðsvirksemið er nágreiniligari lýst í viðfestu Landsliðsætlan SSF 2024-2028

## Úrvalsvirksemi

Ætlaða úrvalsvirksemið er nágreiniligari lýst í viðfestu Úrvalsætlan SSF 2024-2028

## SSF-kalendarin

Ætlaða SSF-virksemið sæst so vítt altíð fram til ársenda næsta ár, á https://ssf.fo/kalendari/, sum avtalað á árligum kalendarafundi, í februar mánaða ella har á leið. Um dagfesting finst.

Út yvir at dagfesta hetta ymiska úr árshjólinum, so vísir SSF-kalendarin hartil serliga nær ið hesar ymisku svimjistevnur eru í Føroyum, sum feløgini á kalendarafundi eru komin ásamt um.

Kalendarin er gjørdur so, at tað fer sjálvvirkandi víðari til tiltakskalendara ÍSF, https://isf.fo/tiltok/, sum hoyrir til bólkin “SSF stevnur”. Tað er tað bláa í SSF-kalendaranum, ið eigur at byrja við “SSF: “.

# Annað virksemi

Út yvir hetta ymiska avtalaða, hevur SSF eina røð av føstum og hugsaðum átøkum, umframt kontórhald og aðra fasta og kravda umsiting. Úr rúgvuni kann nevnast:

## Føst átøk

Landsliðsvirksemi (venjingarlegur o.a.)
AQUASP verkætlanin, har AQUA stuðlar okkum við fígging til mennandi tiltøk
Úrvalsvirksemi, nú framyvir stýrt av SSF sum lýst í nýggju úrvalsreglugerð
Lívbjargingarátakið (útbúgving og prógv til okkara og onnur)
Svimjiskúli Føroya (venjaraútbúgving og merkjaskipan)

## Umhugsað átøk

Løntir samskiparar av stevnum, landsliðsvirksemi, svimjiskúla og/ella lívbjargingarátaki o.ø.
Framleiðsla av undirvísingartilfari til Svimjiskúla Føroya og Lívbjargingarátakið
Framleiðsla av teldlaskipanum til svimjiførleikakanning og lívbjargarayvirlit o.l.
Reglulig kanning av svimjiførleika hjá øllum føroyskum skúlanæmingum í 5. flokki
Svimjiførleikaátak - At fáa børn og vaksin at regluliga meta, um tey kunnu svimja 25, 100, 200 ...
Slóðaraskipanin - hjálp og stuðul til stovnan av svimjifeløgum, har eingi eru

## Fastar útreiðslur

Dagligur rakstur v/aðalskrivara
Bókhald og grannskoðan
Ráðgeving og sakførarakostnaður
Ritbúnaður (heimasíða, bókhald, tpostskipan, stevnuskipan o.t.)
Miðlan og tøkni (lýsingar, prent o.a.)
Telefon og internet
Nevndarfundir (starvsnevnd, svimjinevnd, møguliga aðrar eisini)
Skeiðsvirksemi (serliga luttøka, men møguliga eisini fyriskipan)
Koyripengar ísv nevndarfundir o.t.
Klæðir og klædnaprent
Svimjihettur til landsliðið
Nálir, merkir og prýðislutir
Dómarar (útbúgving og útreiðslur ísv stevnur)
Tryggingar (vinnuferðatryggingin umframt nú eisini leysafæstrygging)
Altjóða umboðan í AQUA, EA, NSF, ILS, ILSE og ILSG

ATLANTIC AIRWAYS